


Eirikur Danielsen
Lívfrøðilesandi

# Korallir; forkálka

**Eins og stóru regnskógirnir á landi, eru koralløkini í sjónum støð við fjølbroyttum umhvørvi, og harvið nógvum ymiskum verum. Men korallirnar vaksa seint og eru tí sera viðkvæmar fyri ógvusligum órógvi. Ein álvarsligur trupulleiki er tí, at fleiri av hesum økjum eru ruddaði fyri korallir av fiskiskipum í teirri ævigu leitan eftir løtuvinningi. Men um vit eisini vilja hava fiskiskap í framtíðini, mugu vit fara væl um hesi økir**



**Mynd 1**
*Greinar av Lophelia korallum. Í sjónum liva korallverurnar mest í toppinum av kálkgreinunum, og so hvørt sum korallin veksur, flyta korallverurnar við úteftir, og eftir standa beru kálkgreinarnar*

Nevnir tú orðið korallir, hugsa tey flestu helst um heitan sjógv fram við tropiskum strondum, við alskins litfagrum vøksti og djórum. Men eisini her norðuri í kalda og gráa Norðuratlantshavi finnast koralløki við ríkum djóralívi. Fram við norsku strondini og í Hetlandsrennuni eru nógv koralløki, men tey eru eisini at finna rundan um Føroyar og við bankarnir sunnanfyri okkum. Hetta eru øki, har serliga djúphavskorallin Lophelia pertusa, hevur bygt størri og minni korallriv. Av tí at tað finst so nógv lív á hesum økjum, eru tey týdningarmikil fyri nógv av teimum fiskasløgum, sum vit liva av.

## Risar gjørdir av smáverum

Korallir eru smá djór, ið liva saman í samlag (koloni). Tey hoyra til ein bólk, ið kallast Cnidaria, og eru tí mest í ætt við hvalspýggju og sjónotu. Eins og sjónotur hava tey kampar (tentaklar), og tey sita á kálkgreinum, sum tey gera sjálvi, og liva av at síla lívfrøðiligt tilfar úr sjónum. Mynd 1 vísir nakrar tílíkar kálkgreinar. Kálkin er avlopstilfarið hjá teimum, og tá tey útskilja tað, verður stórur partur liggjandi, og tað er hetta sum gerst til stór koralløki. Men av tí at djórini eru so smá og hetta hendir so seint, tekur tað langa tíð hjá einum korallrivi at blíva stórt. Norskar kanningar hava víst, at Lophelia korallir vaksa við uml. 6 mm. um árið, so riv, ið eru 1 til 2 metrar høg eru fleiri hundrað ára gomul. Tey størstu eru uml. 30 metrar høg og hava eitt tvørmát á uml. 200 metrar, og hava tí verið í ger í fleiri ártúsund.

Korallirnar í heitari sjógvi eru samansettar av korallverum og algum, og tað eru algurnar sum gera tær so litfagrar. Hesi øki eru oftast har grunt er, tí algurnar mugu hava ljós fyri at yvirliva. Men her norðuri er talan um djúphavskorallir, ið liva ov djúpt til at ljós sleppur niður til tær. Tí hava hesar korallverur ikki algur livandi saman við teimum.

## Týdningurin av korallum

Mynd 2 vísir ein part av einum fjølbroyttum koralløki. Jú meiri fjølbroytt eitt øki er, jú fleiri djóra- og plantusløg kunnu liva har. Nógv føði er at finna við eitt korallriv, og smáfiskur og djór fáa goymt seg fyri fíggindum. Holur og rivur, skapað av korallverunum, eru sum gjørd til endamálið. Eisini inni í korallrivunum, har minni streymur er, ber til hjá bæði fiski, plankton og ymiskum botnlivandi djórum at goyma seg. Dømi eru um, at uml. 300 ymisk djór eru funnin í eini tílíkari korall. Fleiri fiskasløg gýta har korallir eru. Tískil hava hesi øki eisini stóran týdning, tá talan er um tilgongdina av ymiskum fiskasløgum.

Harumframt eru nøkur av djórunum við korallir, bara at finna



**Mynd 2**
*Vistfrøðiliga eru koralløkini sera týdningarmikil, tí tey skapa stórt fjølbroytni og harvið nógv ymisk búpláss hjá djórunum, ið liva har. Djúphavskorallir eru sum oftast hvítar, men kunnu eisini vera reydligar*



**Mynd 3**
*Leivdir av Lophelia korallum. Tað, ið fyrr var eitt ríkidømi av livandi verum, liggur nú sum ein kirkjugarður av deyðum korallum*

Sosialurin